Borgarafundur í Klaksvík:

Ungdómurin skal hava kommunalt tilboð

Klaksvíkar kommuna er sinnað at geva ungdóminum í býnum eitt nýtt tilboð, men tað kemur ikki upp á tal at hava kommunalan dans í Klaksvík. Mikukvøldið var borgarafundur um ungdómsviðurskiftini í Klaksvík

Mikukvøldið hittu umboð fyri Klaksvíkar kommunu foreldur á máli um ungdómsviðurskiftini í Klaksvík

UNGDÓMSFUNDUR
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Meiningarnar og hugskotini vóru nógv, tá Klaksvíkar kommuna mikukvøldið bjóðaði foreldrum á fund um ungdómsviðurskiftini í býnum.

Endamálið við fundinum var at fáa foreldrini at siga sína hugsan um, hvussu tað ber til at fáa allan ungdómin í Klaksvík at trívast í býnum – eisini tey, sum ikki brúka núverandi tilboð.

Misnøgd er millum ein part av ungdóminum í Klaksvík, sum gremur seg um vantandi tilboð.

Breið semja var millum politikarar og fundarfólk um, at kommunan ikki skal taka yvir leiklutin hjá foreldrunum. Og kommmunan skal heldur ikki syrgja fyri diskoteki til tey ungu.

Hinvegin skal kommunan royna at geva ungdómin eitt nýtt og gott tilboð í einum tilhaldsstaði.

Ongan almennan stovn

Umboð fyri Klaksvíkar kommunu høvdu smærri innlegg á fundinum, og ráðgevin hjá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum, Carl August Arge, hevði eisini ein fyrilestur. Aftaná var kjak um ungdómsviðurskiftini í býnum.

– Ofta verður tosað um, at almennir stovnar skulu loysa allar trupulleikar í samfelagnum. Men vit hava ikki brúk fyri einum nýggjum almenni stovni fyri at loysa trupulleikarnar við ungdóminum. Foreldur, ung og politikarar skulu samstarva fyri at fáa nakað gott burturúr, segði Eyðgunn Samuelsen, sum er forkvinna í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu, í sínum innleggi.

– Hetta eru broytingartíðir, samfelagið broytist, vit verða undirdíkt í upplýsingum úr øllum ættum, og tey ungu skulu gera nógv val. Tað ræður um hjá okkum at fóta okkum í hesum nýggju tíðum, segði hon.

Einki ítøkiligt

Forkvinnan í mentanarnevndini greiddi frá, hvat Klaksvíkar kommuna hevur arbeitt við seinastu tíðina, men tað var lítið ítøkiligt at frætta um hetta. Talan hevur verið um at gera ungdómshús í býnum, men hendan ætlanin er ongan veg komin enn.

– Vit hava fingið tey ráð, at tað ræður um at taka sær góða tíð at fyrireika eitt ungdómshús, tí tað er sera umráðandi at fáa góða byrjan. Eru tað trupulleikar at byrja við, so ber tað næstan ikki til at koma afturum aftur, segði Jórun Høgnesen.

– Vit vilja hava øll góð hugskot – bæði frá foreldrum og frá ungum – so vit kunnu gera eitt ungdómshús, sum kann virka, og sum tey ungu fáa gleði av, segði hon.

Klaksvíkar kommuna ætlar í næstum at seta eitt fólk at orða ein ungdómspolitikk, og hetta fólkið skal eisini fáa ungdómshúsið at virka.

Eingin kommunalur dansur

Kjakið á fundinum var konstruktivt og positivt. Fólk vóru á einum máli um, at kommunan skal taka stig til at gera ungdómshús, men tey hildu somuleiðis, at tey ungu mugu takast við upp á ráð.

Kjakið fór eina løtu frá ungdómshúsi og til dansistað til tey ungu. Summi fundarfólk hildu, at kommunan skuldi verða við til at loysa tann trupulleikan, so tey ungu undir 18 ár aftur fingu eitt dansistað í býnum.

Umboðini fyri Klaksvíkar kommunu vóru samd um, at kommunan fer ikki at skipa fyri dansi í býnum, men tað kundi koma upp á tal, at kommunan kundi hjálpa til á onkran hátt.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, legði eins og ráðgevin hjá Rúsdrekka og Narkotikaráðnum stóran dent á, at kommunan skal ikki taka yvir leiklutin hjá foreldrunum, og at tað er umráðandi at foreldur eru við til at fáa tey ungu at trívast.

Deiggj ger aftur vart við seg

Leygarkvøldið fara Fróði Vestergaard og hansara menn í Deiggj at spæla til dans á Tvøroyri

20 ára gamli bólkurin Deiggj fer at spæla til dans í TB-húsinum leygarkvøldið

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Nú fer suðuroyarbólkurin Deiggj aftur á pallin. Hetta hendir á Tvøroyri, tá teir fara at spæla til dans í TB-húsinum leygarkvøldið.

Tað var eisini á Tvøroyri, at bólkurin var stovnaður fyri 20 árum síðani.

Teir sum stovnaðu bólkin vóru, Páll Lave, Pætur Dam, Fróði Vestergaard, Dennis Lave, Dávið Jacobsen og René Jespersen. Meira enn 20 ymiskir tónleikarar hava spælt fast við Deiggj seinastu 20 árini, men tann núverandi manningin er næstan tann sama, sum tann sum spældi fyrstu ferð í 1981.

Teir, sum spæla við komandi vikuskiftið, eru Páll Lave, Pætur Dam, Fróði Vestergaard, Sverri Heinesen, Dánjal Jákup Holm og Dennis Lave.

Deiggj góvu út í 1985 eina LP undir heitinum »Stormávaring«. Umframt hetta vóru Deiggj við á Amnesty tónum, á TB-bandinum,ið kom út í 1992, tá ið TB fylti 100 ár, Vælskapt Brek í kom út í fjør og eisini hava limirnir í Deiggj undir heitinum »Sveiggj« eitt lag við á seinastu barnafløguni hjá Útvarpi Føroya.

Venja hvørja viku

Deiggj hava egna venjingarhøli og studio í Havn. Bólkurin venur fast eina ferð um vikuna og arbeitt hevur við at byggja upp eina fjøltáttaða skrá, ið hóskar bæði til yngri og eldri.

Tað vísur seg, at flestu aldursbólkar dáma væl løg frá 70´unum og 80´unum, t.d. Cream, Deep Purple, John Lennon, Eric Clapton, Gasolin, Procul Harum, Supertramp og Men at Work. Eisini nýggjari tónleikur verður framførdur hetta vikuskiftið. Sum dømi kunnu nevnast løg hjá R.E.M. okkurt hjá Red Hot Chilly Pepper og eldri tónleikur frá sektiárunum sum t.d. Simon and Garfunkel, Bee Gees, Beatles og Rolling Stones. Av norðurlendskum tónleiki kunnu nevnast Afzelius, Mikael Wiehe, Martin Joensen, Vestmenn, Kári P., Frændur og okkurt heimagjørt lag.

– Í løtuni arbeiða vit nógv við løgum hjá øðrum. Seinni verður kanska arbeitt meira við egnum løgum. Og hvør kanska kemur eisini ein nýggj fløgu, siga teir í Deiggj.

Havt tvær framførslur

Síðan bólkurin varð endurstovnaður við núverandi manning, hevur bólkurin havt tvær framførslur eina á Arkitektaveitsluni í Sjónleikarahúsinum og eitt vikuskiftið í Kagganum.

Teir, sum eru við í Deiggj hava ikki spælt nakað serliga nógv við øðrum bólkum, undantikið Dánjal Jákup Holm, sum er kendur trummusláari frá bólkunum, Revival, Júmen og Wild Child. Sverri Heinesen hevur verið við til at stovna kenda bólkin »Absurdy Fair« og hevur altíð spælt við teimum.

Pætur Dam, ið spælur tangentar, spældi seinast við Deiggj í 1988 og hevur hesi13 árini ikki verið virkin í nøkrum tónleikabólki. Páll Lave var upprunaliga bassistur í tí fyrsta Deiggj. Hann spælur nú sologittar. Páll hevur eins og Pætur Dam búð í nógv ár í Danmark og hevur tískil ikki verið so aktivur føroyska rokkpallinum.

Fróði Vestergaard hevur spælt við Deiggj í næstan øll árini eins og Dennis Lave, sum í løtuni er heima í feriu nakrar mánaðir. Dennis býr vanliga í Aasiaat í Grønlandi, men flytur væntandi heim til Føroya komandi summar.

Ikki bara nostalgi

Onkur heldur kanska bólkurin bara satsar uppá nostalgi, men so er ikki.

– Vit vilja fegnir verða nýskapandi, og vit fara í framtíðini at royna eitt sindur hvørjum. Hetta vikuskiftið sleppa suðringar ein túr aftur í hálvfjersini og fram í hálvfemsini. Næstu ferð verður tað kanska nakað heilt sum vit fara at borðreiða við, siga teir.

Leygarkvøldið er aldursmark 18 ár og teir í Deiggj vóna at síggja nógv av teimum, ið vóru ung í hálvfjersunum og fýrsunum, til dansin.

Bjargingarbrøgd

Frásagnir um hendingar, har mannalív eru bjargað, eru savnaðar í bók, sum Erling Poulsen hevur givið út

BÓKAÚTGÁVA
Edvard Joensen

Sum vera man eru flestar søgurnar av sjónum, tó at onkur bjargasøga er ímillum. Flestu frásagnirnar í bókini hava verið sagdar fyrr. Men seinasti parturin hevur ikki verið prentaður áður.

Ofta er tað so, at fólk, sum framt hava roysni, serliga har onnur eru bjargað úr vanda, siga lítið um tað fyri øðrum. Tó onkur er, sum hevur hug at siga frá. Viðhvørt í meira lagi, halda onnur, sum kanska hava verið við.

Eina slíka søgu fáa vit í bókini hjá Erlingi Poulsen um bjargingarbrøgd. Prestafrásøgnina um ferðina, tá hvalbingar á veg til Sands við presti settu upp á Dímun.

Í meira lagi av reypi og ikki øll søgugongdin eftirfarandi heldur, vil so onkur annar, sum við í ferðini var, vera við. Og so fáa vit heilt aðra útlegging av somu søgu frá manni, sum eisini var við á somu ferð, sum prestur. Áhugavert at síggja, hvussu ymisk uppfatanin kann vera av somu hending.

Bókin er sett upp í pørtum, har hvør frásøgnin líkasum ger ein part. Onkunstaðni eru frásagnirnar tó so mikið drúgvar, at tær eru býttar sundur í fleiri. Eitt nú tann um prestaferðina, har sagt verður frá í tveimum umførum av tveimum ymiskum persónum.

Í tí førinum virkar tað eitt sindur ørkymlandi, tá danska frágreiðing hjá presti verður lisin, at tað knappliga koma føroyskar viðmerkingar frá høvundanum sjálvum mitt í søguni.

Seinasti parturin er um, tá dekksbátar í Vági bjargaðu fleiri útróðrarbátum úr Porkeri, sum komu illa fyri á floti sunnanfyri. Ein hending, sum kundi, um illa vildi til, fingið ólukkuligar fylgjur fyri Porkeris bygd, sum hon valla hevði risið undan aftur. Hendan frágreiðingin, sigur høvundin, hevur ikki verið prentað fyrr.

Byrjanin av bókini eru frásagnir frá, tá Ernestina fór á land undir Íslandi og ymisk, sum síðan er hent í tí sambandi. Eitt nú um ferðina í Íslandi í fjør, tá avvarðandi vóru aftur á staðnum. Hesin partur fyllir umleið helvtina av bókini, og er eingin nýggjheit sum so, tí tilfarið er slíkt, sum hevur verið prentað áður. Sum fyri heilt stuttum í FF blaðnum, eins og ymiskt er kent aftur frá jólabløðum o.t.

Ein partur nevnist »Sorgardagur í Sumba«, sum tókti mær eitt sindur løgið, tá talan skuldi vera um bjargingarbrøgd. Her mundi einhvør vanlukka vera hend undir onkrari bjarging ella so. Men so var ikki, og endaði øll hendingin væl. So mikið løgnari tykist mær yvirskriftin, fyri ikki at siga beinleiðsi misvísandi. Tí frøi mundi vera í Sumba eftir tað roysnið, hesir sumbingarnir gjørdu í berginum hesa náttina, sagt er frá.

Bókin Bjargingarbrøgd er 128 blaðsíður við innihaldsyvirliti, keldulista og navnalista. Hon er í støðum eitt sindur tung at lesa, beinleiðis nevnd. Men frágreiðingin hjá sumbingarnum, sum er orðarætt endurgivin, sum hann hevur sagt frá, tykist mær eisini sum ein slík, og hevur ov nógvar óneyðugar vendingar og endurtøkur við sær.

Men hon er sera áhugaverd soleiðis, at her fáa vit eina gjølliga lýsing av dialektini hesin maður hevur tosað, og sum er sera góð at eiga til seinni savn. Tí slíkt dettur burtur í hesum tíðum, nú alt verður so óhugnaliga harmoniserað, at ein ikki so frægt sum hoyrir, um maður er svíningur ella sumbingur.

Á permuni stendur, eitt stórt eittal, sum bendir á, at hendan bókin er tann fyrsta í eini rød, sum høvundin eisini sigur frá. So væntandi fer tann næsta at liggja á borðinum um somu tíð komandi ár.

Bátar við bryggju í Porkeri. Hesi bátarnir eru størri enn teir, sum brúktir vóru í 1934, tá vanlukka mundi staðist av

Opið til kl. 23⁰⁰ fríggjadagin 7. desember

Nýtt romantiskt stell

Stórt úrval av jólaprýði

Hjá Annu

Vágstún 2 700 Klaksvík tel. 455238